# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vinna í trupulleikum

Helvtin av djúvatnsflotanum liggur, og støðan í Suðuroy er nærmast katastrofal. Hesar vóru tvær av yvirskriftum okkara í gjár, og tykjast tær boða mestsum frá búskaparligum ófrættum. Á Tvøroyri liggja fýra skip antin orsakað av manningartroti, ella tí raksturin ikki hongur saman, og støðan í Vági er heldur ikki tann besta. Sum kunnugt er nógvir djúpvatnstrolararar í Suðuroy, og tí er oyggin meint rakt av teimum trupulleikum, sum alt meria eyðkenna partar av fiskivinnuni. Støðan er soleiðis, at helvtin av flotanum í Suðuroy liggur, og hin helvtin siglir undirmannað. Í Havn liggja Kalsevni, Grímur Kamban og Eydna, sum er fyrrverandi Vesturvarði. Summi av hesum skipum liggja, tí ymiskar ábøtur eru ella verða gjørdar, onnur tí tað gongur illa at fáa fólk, og í triðja lagi liggja djúpvatnstrolarar, tí tað loysir seg ikki at byrja nýggjan túr. Týðandi partur av fiskivinnuni er sostatt í trupulleikum.

Vit hava áður her í blaðnum skrivað um trupulleikarnar hjá pørtum av skipaflotanum at fáa samanhang í raksturin orsakað av methøgu oljuprísunum. Í gjár greiddi reiðari í Havn frá, hvussu raksturin djúpvatnstrolarunum sær út, og tað skal ikki nógv hugflog til at skilja, at her hongur ikki saman við galdandi oljuprísum. Ein annar trupulleiki er sjálvsagt, at fiskaprísirnir ikki hækka samsvarandi oljuprísunum, og so er ein meginforteytin fyri sunnum rakstri burtur. Sama reiðari vísir á, at matvøruprísirnir nú hækka um allan heim, men at hetta rákið ikki enn fevnir um fisk og fiskaúrdráttir. Síggja vit fiskaprísirnar í søguligum høpi, so kann tó roknast við, at hesir prísir eisini fara at hækka eins og allir aðir matvøruprísir í heiminum.

Samatikið eru sostatt tríggjar meginorsakir til trupulleikarnar hjá serstakliga djúpvatnstrolarunum: manningartrot, oljuprísir og fiskaprísir. Í teimum døgum, tá Føroyar mestsum vóru skipaðar við planbúskapi, høvdu landsins myndugleikar alt fyri eitt lagt seg út í hesa kreppukendu støðu. Helst høvdu studningslógir verði samtyktar út frá tí sjónarmiði, at vinnan skal ganga fyri einhvønn prís. Men nú hava Føroyar marknaðarbúskap, og tað er mestsum ein átrúnaðarspurningur, at vinnan sjálv skal loysa sínar trupulleikar. Men hetta, at tær frælsu marknaðarkreftirnar ráða einsamallar, merkir vanliga ikki, at eitt land als ongan vinnupolitikk hevur, tá tað kemur til trupulleikar í ávísum vinnugreinum. Fiskivinnan hevur stórar bygnaðarligar trupulleikar, og arbeitt verður við nýggjari veiðilóggávu, sum m. a. skal tryggja ein burðadygga vinnu. Hetta arbeiðið hevur skund. Myndugleikarnir sleppa neyvan undan samstundis at líta at allari vinnuni sum eina heild, tí trupulleikarnir á landi eru ikki minni enn á sjógvi. Uttan mun til, hvat úrslitið verður, slepst neyvan undan tiltøkum, sum allir partar fara at merkja.

**Sosialurin**

## Undir Ryggi (Kielerkanalin)

**JÓGVAN SOFUS VÁGSHEYG**
Undir Ryggi 3, Tórshavn



Niðri í Kielerkanalini (í Havn) stendur eitt træ (enn). Tað skal nú takast burtur.

Hví? Tí at partur av gomlu Dimmu skal gerast til "fitnessentur" hjá starvsfólkunum í Tryggingarfelagnum Føroyar.

Vælsignaði starvsfólk!

Mótmælið at træið verður tikið burtur.

Ein av mongum orsøkum til, at træið eigur at fáa frið:

Eitt í føroyskum høpi so peningasterkt felag sum Tryggingarfelagið Føroyar átti at verið meira umhvørvisvinarligt. Eitt træ økir ikki um $CO_2$ mongdina, sum vit senda út í umhvørvið (tvørturímóti), men tað ger eitt "fitnessentur".

## Sjálvhjálpin skal styrkja sjálvkenslu og sjálvsábyrgd

**TÍÐINDASKRIV**
*Sjálvhjálpin*

Sjálvhjálpin lat upp tann 31. oktober 2007 í hølunum Gongin 20 í Havn. Mikudag frá kl. 16 til 18 svara ráðgevarnir spurningum bæði umvegis telefon 280005 og eisini ber til at støkka inn á gólvið. Haraftrat svarar telefonin gerandisdagar frá kl. 12 til 16, har møguleiki er at seta fram spurningar. Eisini er møguleiki at senda mail info@sjalvhjalpin.fo.

Sjálvhjálpin er eitt ókeypis og anonymt tilboð um holla upplýsing, ráðgeving og vegleiðing. Sjálvhjálpin er óheft av politiskum og átrúnaðarligum hugburði. Í Sjálvhjálpini fæst upplýsing, ráðgeving og vegleiðing í einstaklinga- og familjuviðurskiftum. Tað veri seg fyribyrging, kvinnur/pør ið umhugsa, ella hava fingið framtfosturtøku, trupulleikar í parlagi, kvinnur/menn útsett fyri neyðtøku og kynsligari misnýtslu og ivamál av sosialum og persónligum slag. Ráðgevarnir umboða fylgjandi fakbólkar: sosialráðgevi, sálarfrøðingur, gudfrøðingur og sexologur. Øll ið eru knýtt at Sjálvhjálpini hava tagnaðarskyldu.

Endamálið við Sjálvhjálpini er at miðja ímóti at styrkja støðuna hjá tí einstaka, at styrkja sjálvskenslu og sjálvsábyrgd, soleiðis at tann einstaki í størri mun fær styrki at taka avgerðir í lívsins viðurskiftum. Sjálvhjálpin veitir ikki viðgerð, men er eitt ískoyti til aðrar stovnar. Tann ið vendir sær til Sjálvhjálpina fær eitt lurtandi oyra frá einum, ið skilir støðuna, vísir umhugsni og gevur holla vegleiðing og ráðgeving.

Sjálvhjálpin ger hagtøl fyri at meta um tørvin á ráðgeving og fyri at lýsa, hvørjar trupulleikar fólk venda sær til Sjálvhjálpina við, hvør tað er, sum søkir hjálp, hvørjir ráðgevar serliga vera eftirspurdir, og hvussu tíðarkrevjandi arbeiði er og búðstað, hjúnarstøðu, aldur, útbúgving/arbeiði og børn. Hagtalsbløðini eru ónavngivin, og tað ber ikki til at kenna aftur, hvør hevur vent sær til Sjálvhjálpina.

Hagtalsblað verður skrivað eftir hvørjari áheitan.

Í november vóru 4 áheitanar, december 12, januar 18, februar 12, mars 15 og í apríl 24. Kvinnur hava vent sær 32 ferðir, menn 13 ferðir, 4 samrøður/ráðgeving hava verið til pør og restin av áheitanunum hava verið um telefonina.

Bústaðarkommunurnar eru býttar í 7 ymiskar kommunur, flestu áheitanirnar koma úr Tórshavn.

Ofta venda fólk sær við fleiri enn einum trupulleika. Áheitaninar hava verið um: Við barn, blóðskemd, kynslig misnýtsla, onnur misnýtsla, foreldramyndugleiki, samverurættur, búskapur, búðstaðarviðurskifti, ótrúskapur, harðskapur, sundurlesing, barnapeningur, sorg, kærumál, chikane/happing, sex-chikane, kynsligir trupulleikar og upplýsing um Sjálvhjálpina.

Øll, sum hava vent sær til Sjálvhjálpina hava fingið ráðgeving/vegleiðing, av teimum eru 15 víst til ávikavist kommunulækna, sálarfrøðing, Almannastovuna, Ríkisumboðið, Barnaverndastovuna og Rættarhjálpina.

Heimasíðan hjá Sjálvhjálpini er at finna á adressuni: www.sjalvhjalpin.fo

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.